


SUNDA KOMMUNA

# Pedagogar til Dagstovnin á Flatinum

**Vit søkja eftir pedagogum til:**

- **vøggustovuna Ennið við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár**
- **barnagarðsstovurnar á Mýru og á Túvu við 20 børnum í aldrinum 3-5 ár**

**at byrja 1 februar ella eftir nærri avtalu. Størvini eru 30 – 40 t um vikuna og arbeiðstíðin er ímillum 7.15 og 17.15.**

**Vit ynskja**

- at tú kanst skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum,
- at tú kanst taka ábyrgd og virka í góðum samstarvi við starvsfelagaðar og foreldur
- at tú sært møguleikar og avbjóðingar, fram um mørk
- at tú verður við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvið

**Vit kunnu bjóða**
eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika at gera tína ávirkan galdandi og har tú saman við dugnaligum pedagogum og hjálparfólkum ert við til at víðarimenna tað pedagogiska umhvørvi á einum stovni har karmarnir eru sera góðir.

**Setanarviðurskifti:** Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið á lønarstigi 11 – 18.

Um ongin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað.

**Meira fæst at vita:** um størvini við at tosa við Rosu Prestá leiðara á tlf 737247 ella Sólrún Dam varaleiðara á tlf 737244

**Umsókn** við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 15 januar 08 og sendast til

**Dagstovnurin á Flatinum**
Skúlavegur 9
400 Oyrarbakka

**Um stovnin:**
Vit eru um 100 børn í aldrinum 0 – 10 ár og 25 starvsfólk. Stovnurin er skipaður í 2 vøggustovur, 2 barnagarðsstovur 1 kombineraðað barnagarðs/frítíðarstova og 1 frítíðarstova. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar bæði innan og uttandura, hvør barnastova er ein sjálvstøðug vælútgjørd eind, umframt eitt stórt felagsrúm, viðtaluhølið, serstova og ymisk verkstøð. Økið uttanfyri er stórt við nógvum møguleikum, og stovnurin liggur sera væl fyri t.d. beint við haga og fjøru, við skúla, fimleikarahøll, svimjihøll og góðum busssambandi

veitst tú ikki tað?
Sosialurin